UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum einalærari í Oyndarfjarðar skúla

**Hevur tú hug at royna teg sum einalærara, so er møguleiki at søkja tíðaravmarkað starv sum einalærari í Oyndarfjarðar skúla skúlaárið 2021-22. Starvið verður sett frá 1. august 2021.**

**Um starvið**

Í Oyndarfjarðar skúla verða tríggir næmingar næsta skúlaár, ein næmingur í 1. flokki og tveir í 3. flokki.

Einalærarin er bæði leiðari og lærari í skúlanum. Hann undirvísir í flestu lærugreinum og hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans.

Einalærarin skal fremja gott samstarv millum skúla og heim og virka fyri, at næmingarnir trívast og fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalærara-útbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur at hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av prógvi, c.v. og øðrum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **20. mai 2021**.

**Umsóknin verður stílað til:**

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti**: ummr@ummr.fo**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita uttanríkismál, undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*